

*Simona Dziugyte skal komandi kappingarár spæla fyri Neistan*

*Savnsmynd*

# Simona Dziugyte til Neistan

**Neistin hevur við spælarum sum Jórun Ludvig, Maritu Hermansen, Christinu Holm og nú Simonu Dziugyte, rættiliga brynja seg út til komandi kappingarár**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Sterki litavski bakspælarin, Simona Dziugyte, og Neistin eru komin ásamd um sáttmála fyri komandi kappingarár.

Simona hevur verið í Føroyum tvey tey seinastu árini, har hon hevur spælt fyri bæði Sóljuna og Stjørnuna. Fyrsta árið gjørdist hon besti málskjútti í kvinnudeildini, meðan skaðar í fjør høvdu við sær, at Simona ikki gjørdist so drúgvur málskjútti á liðnum hjá Stjørnuni.

Simona Dziugyte er helst ætlað at avloysa Katrina á Neystabø á vinstra bakki, sum seinni í summar skal til Danmarkar í lestrarørindum.

Spælarin frá Litavia er ein av fleiri nýggjum spælarum, ið skulu tørna út fyri 1. kvinnulið hjá Neistanum komandi kappingarár. Umframt Simonu, verða Jórun Ludvig, Marita Hermansen og Christina Holm eisini at síggja á Neistaliðnum í vetur.

Úr Neistanum verður sagt, at tá liðið missir so týðandi spælarar sum, Gunnleyg Berg, Biritu Wardum, Katrina á Neystabø og Anniku Thomsen, so er felagið noytt til at leita sær styrk, um liðið skal gera seg galdandi komandi kappingarár.

At Neistin hevur styrkt um liðið, er eitt gott tekin um, at tey í Neistanum ætla nakað á kvinnusíðuni í ár, og liðið má vera eitt tað besta boðið uppá at taka kappingina upp við VÍF-kvinnurnar, ið hava verið einaráðandi tvey tey síðstu árini.

# Din Sandu er farin av landinum

**Nógvu skaðarnir er høvuðsorsøkin til, at rumenski spælarin ikki kemur aftur til Føroya**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*



*Din Sandu er longu farin av landinum aftur*

*Mynd: Savnsmynd*

Rumenski miðvallarin hjá B36, Din Sandu, verður ikki at síggja á B36-liðnum í seinnu hálvu. Hann er farin heimaftur til Rumenia, og kemur ikki til Føroya aftur.

Din Sandu hevur verið hart raktur av skaðum, og er hetta høvuðsorsøkin, at samstarvið millum hann og B36 er dottið niðurfyri.

Úr B36 siga tey, at Din Sandu er ein rættiliga góður leikari, men at teir mongu skaðarnir høvdu við sær, at lítið røktist fyri, at hann gjørdist serliga støðugur á besta liðnum hjá felagnum.

Serliga hevur tað verið harða graslíkisundirlagið, ið hevur verið atvoldin til skaðarnar, og tá rumenski spælarin var komin nakað til árs, var lítið sannlíkt, at hann rættiliga kom at venja seg við undirlagið.

# AB-Cup 2002

**AB skipar fyri summarkapping í ungdómsfótbólti á vøllinum á Argjum í døgunum 9.-11. aug. Seinasta freist at melda lið til kappingina er 25. juli 2002**

TÍÐINDASKRIV
*Argja Bóltfelag*

Argja Bóltfelag fer aftur í ár at skipa fyri fótbóltskapping á vøllinum á Argjum. Kappingin AB-CUP 2002, byrjar fríggjadagin 9.august, og heldur fram til sunnudagin 11. august. Aldursbólkarnir verða hesir, pinkur, gentur 10-12 ár, smágentur, gentur 14-17, pinkulingar, smápiltar, piltar, smádreingir og dreingir

Leikt verður á hálvum vølli, tó leika pinkur og pinkulingar á kvartum vølli.

Nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir til ognar, og vinnandi liðið í hvørjari deild vinnur steyp til ognar

Leiktíðin verður 2 x 7 minuttir. Luttøkugjaldið er 300 kr. Fyri hvørt liðið. Tað er bert loyvt at hava 10 leikarar á hvørjum liði, og sjey av teimum hava loyvið at verða á vøllinum í senn.

Tilmelding til kappingina skal verða AB í hendi í seinasta lagi 25.juli 2002, saman við kvittan um at luttøkugjaldið er goldið. Tilmeldingin kann eisini sendast við t-posti til ab@ab.fo ella at ringja til Jóhann M. Stenberg tlf. 284142. Luttøkan er avmarkað

Fleiri upplýsingar um kappingina kunnu lesast á heimasíðuni hjá felagnum: www.ab.fo

# Finalurnar í steypakappingunum

**Finalurnar í kappingini um Løgmanssteypið og í Steypakappingini hjá Kvinnum**

TÍÐINDASKRIV
*Fótbóltssamband Føroya*

Finalan í Steypakappingini hja Kvinnum millum HB og KÍ verður leikt á Ovaravølli í Gundadali, Ólavsøkudag. kl. 13.30

Dómari verður Jens Petur Brattalíð

Hjálpardómarar verða Eyðun Kjærbo og Poul Erik Jacobsen

4. dómari verður Jóhan Krogh

Finalan í kappingini um Løgmanssteypið millum HB og NSÍ verður leikt á Tórsvølli, Ólavsøkudag kl. 16.30

Dómari verður Birgir Sondum

Hjálpardómarar verða Regin Egholm og Georg N. Rasmussen

4. dómari verður Jógvan Næs.

# Rio Ferdinand dýrasti verjuspælari nakrantíð

**Fyrrverandi Manchester United spælarin, Jaap Stam, er nevndur sum møguligur avloysari í Leeds-verjuni.**

ENSKUR FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Seinnapartin mánadagin gjørdist so endaliga greitt, at enski landsliðsleikarin, Rio Ferdinand, skiftir til Manchester United fyri 29,3 mio. pund. Rion Ferdinand verður sostatt dýrast verjuspælari í heiminum

## Fimm ára sáttmála

Verjuleikarin og Manchester United er komin ásamt um ein fimm ára sáttmála, og Rio Ferdinand fær 70.000 pund um vikuna tey næstu fimm árini.

Rio Ferdinand var fegin um skiftið, – Sjálvsagt eri eg fegin, tí eg skal spæla fyri ein av størstu feløgunum í heiminum, og eg ivist ikki í, at vit fara vinna nógvar titlar næstu árini, segði enski verjuleikarin á tíðindafundinum mánadagin.

Fyri sløkum hálvum øðrum ári síðan, skifti Rio Ferdinand frá West Ham til Leeds fyri 18 mio. pund, so ikki kann annað sigast, at nýggju Manchester United spælarin er ein umbiðin harri.

## Stam skal avloysa

Stendur tað til nýggja Leeds-venjaran, Terry Venables, so skal hollendski landsliðspælarin, Jaap Stam, avloysa Rio Ferdinand í Leeds-verjuni.

Jaap Stam hevur spælt í Lazio seinasta árið, og keldur vilja verða við, at hann ikki trívist so væl í Italia, og vil til Onglands aftur, og nú hevur so Leeds boða frá, at felagið er áhugað í sterka verjuleikarnum.



*Nýggji Manchester United-spælarin, Rio Ferdinand, er dýrasti verjuspælari í heiminum*



Uttanumtos samgongunnar:

# Kriminaliserað løgmansembæti

**Bergur P. Dam**
*næstformaður í Javnaðarflokkinum*



**Fólkaflokkurin krevur svar uppá ikki-spurningar og fær ikki-svar frá Tjóðveldisflokkinum. Men støðan er framvegis at løgmaður annaðhvørt beinan vegin má reinsa seg, ella leggja frá sær.**

Makabra søgan um skuldsetingarnar frá Tórbirni Jacobsen ímóti løgmanni og fiskimálaráðharranum heldur fram. Í felag royna Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin at grugga málið so nógv, at tað kann fjara burtur.

**Brævlótir**

Fólkaflokkurin hevur sent Tjóðveldisflokkinum eitt onkisigandi ultimatum, har tey krevja svar uppá spurningar, sum ikki viðkoma kjarnini í spurninginum. Tí veruliga málið snýr seg um, at løgtings, fólkatings- og samgongulimurin Tórbjørn Jacobsen, skuldsetur løgmann at vera so kriminellan, at hann ikki kundi sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi.

Og fyri tann spurningin er tað fullkomuliga líka mikið, um onnur í Tjóðveldisflokkinum eru samd ella ikki og tað hevur enn minni týdning at vita, hvørt Tjóðveldisflokkurin stendur við samgonguskjalið ella ikki. Tað er eitt heilt annað mál, sum kann viðgerast fyri seg.

Hvat Tjóðveldisflokkurin so svarar uppá teir ikki-spurningar, sum Fólkaflokkurin setur, so standa skuldestingarnar hjá Tórbirni framvegis við. Og løgmaður hevur onki gjørt fyri at reinsa seg.

Tí tað er bara ein máti, løgmaður kann reinsa seg: Skuldsetingar mugu verða gjørdar til onkis, annahvørt soleiðis at Tórbjørn Jacobsen - sjálvboðin ella noyddur av sínum partamonnum - alment kunngerð at hansara skuldsetingar eru rangar, ella at dómsvaldið staðfestir, at skuldsetingarnar eru órættar og dømir tær deyðar at verða.

Megnar løgmaður ikki at reinsa seg á henda hátt, so má hann leggja frá sær.

**Omandottið trúvirði**

Dag undan degi minkar tign løgmansembætisins, sleppa hesar skuldsetingar at standa við. Tað snýr seg jú ikki bert um løgmann sum persón, men fyrst og fremst um alla politisku skipanina í Føroyum. Ongin kann hava álit á eini skipan, har ovasti leiðarin av útinnandi valdinum av sínum egnu er skýrdur at vera so kriminellur, at hann ikki kundi sitið í nakrari aðrari stjórn í heiminum.

Einhvør, sum hereftir skal samskifta við løgmann, fer at gera tað við vitanini um, at hesin ikki afturvísti grovastu skuldsetingum. Tá landsstýrið skal samráðast við onnur lond, veit mótparturin, at samráðingarleiðarin ikki megnaði at vísa aftur skuldsetingum frá sínum egnu.

Í løtuni er støðan hon, at Føroyar hava eitt kriminaliserað løgmansembæti, og verður embæti ikki reinsað nú, verður tað ein myrkur skuggi yvir øllum komandi løgmonnum.

**Atgerðarloysi løgmans**

Vanliga atgerðarloysi, sum hevur eyðkent løgmann í hvørjari kreppustøðu, hevur aftur lagt hann lamnan politiskt. Dagarnir ganga og løgmaður tosar um alt annað. Men onki hjálpir. Skuldsetingarnar hvørva ikki - tvørturímóti vaksa tær fyri hvønn tíma.

Okkara natúrliga krav er tískil at løgmaður annahvørt reinsar seg ella leggur frá sær. Og hann má gera tað nú!

